**Frískir várlitir frá Noa Noa í Tróndargøtu í Havn**



## Góðleiki smittar

Tað góða kemur altíð aftur. Tað vita vit.
Men nú bendir alt á, at fólk, sum uppliva góðleika, sjálvi verða fittari. Ein nýggj kanning, sum granskarar á University of California og á Harward hava gjørt, vísir, at tá tú ert góð við onkran, spjaðir góðleikin seg til viðkomandi, sum so aftur verður góð við onnur. Soleiðis kann tín góðleiki raka hundraðtals onnur menniskju her á jørð.

# Vegleiðing til menn við súrum konum




Ert tú ofta súr við mannin? Gongur við lúna og spælir martýr í tímar og dagar? Nú er liðugt við tí! Tí júst í hesum døgum fylkjast mannfólkini í stríðnum móti súrum konum. Danski provokatørurin og kræsni kennarin, Mads Christensen, hevur skrivað eina vegleiðing til menn við súrari konu. Hvussu fái eg meira sex? Hvussu sleppi eg í býin við vinmonunum? Og hvussu fái eg hana í betri lag? Hetta eru nakrir av spurningunum, sum høvundurin lovar at svara í bókini. Um tað eydnast, lata vit standa til konurnar at meta um.




# Kvinna – kenn tín bil!

Nú er ongin umbering longur. Næstu ferð tú steðgar upp, ber ikki til at senda boð eftir manninum ella sløkkiliðsbilinum. Sama um oljuperan lýsir reytt, dekkið er punkterað ella vinstra baklykt er brostin, kanst tú leita tær ráð og vegleiðing í nýggju bókini "Kvinde kend din bil". Skrivað av kvinnum fyri kvinnur. Enn eitt rætt stig á javnstøðuleið!



**Ynskiteppi frá Mariu Poulsen í miðbýnum Havn**



# Døgurðaslangur mennir minnið

Ein nýggj kanning hjá granskarum á lærda Berkely-háskúlanum í Californina, vísur, at hevur tú fingið ein døgurðaslang, lærir tú betri seinnapart. Sambært kanningini verður tú dølskari, tess longri tú ert vakin. Sambært videnskab.dk er orsøkin, at so hvørt vit troyttast, lata partar í heilanum aftur, ein fyri og annar eftir – akkurát sum ein harðdiskur.

# Skál við viskustykki



»Mormor« er navnið á nýggjari røð av keramikkskálum, har siðbundni køkurin møtir tí modernaða. Nýlærdi danski sniðgevin, Gry Fager, hevur longu nú vunnið nógva viðurkenning fyri stuttliga og vakra køkssettið, sum tekur støði í viskustykkjunum heima hjá ommu. Normann Copenhagen setti beinanvegin røðina í framleiðslu, tá fyritøkan fekk eygað á hana.